# Vit skulu sjálv

ÓLUVÁ KLETTSKARÐ



Í næstum verður nýggj miðnámsskúlaskipan sett í verk. Hvussu henda fer at síggja út er eitt stórt dulsmál, bæði fyri teimum, ið starvast í skipanini, og fyri fólki sum heild.

Í fleiri ár hevur verið arbeitt við einari nýggjari miðnámsskúlaskipan. Tað var meðan Jógvan á Lakjuni sat sum landsstýrismaður í mentamálum, at Mentamálaráðið setti sær fyri at umskipa alt miðnámsskúlaøkið og binda tað betur saman við fólkaskúlan. Nú skuldi føroyingar endiliga fáa eina heimagjørda ætlan, ið var lagað okkara egnu viðurskiftum. Fleiri enn fimmti bólkar hava sitið og snikkað uppskot til, og lærugreinabólkar umboðandi bæði fólka- og miðnámsskúla hava skrivað lærugreinakunngerðir. Hetta arbeiðið skuldi bæði vera vegleiðandi fyri ráðið, men eisini gerast kunngerðirnar hjá lærugreinunum –útgangsstøðið, sum alt frálæruarbeiðið er grundað á.

Tillaging til hvat?

Bólkarnir hava herfyri latið síni avrik inn, og eftirfylgjandi arbeiðið er farið í gongd. Men nú er vent í holuni, og fakfólkini, ið starvast fyri MMR í hesum arbeiði, kenna ikki longur sítt arbeiði aftur. Tillagingar eru nú gjørdar, og fakfólk á økinum sett til viks. Var hetta til tað betra, tænti tað útbúgvingarskipanini ella kunnleikastøðinum, ungdómi landsins, so var onki at vera tykkin um. Men trupulleikin er, at tillagingin er tillagað ókend viðurskifti.

Hvagar gongur leiðin

Nú skal sigast, at fortreytirnar fyri arbeiðinum ongantíð hava verið lýstar. Alt arbeiðið er gjørt, uttan at hvørki faklærarar, næmingar ella Føroya fólk hava fingið nakað at vita um, hvat endamálið við reforminum er. Skulu lærarar okkara gerast dugnaligari, eiga teir at leggja á annan bógv, so vit gerast eins framkomin og onnur, skulu teir dagførast? Ella eru krøvini broytt til víðari lesnað, sum vit sjálvandi eiga at laga okkum eftir? Ella er kunnleikastøðið ov lágt –skulu vit lyftast, eins og norðmenn hava sett sær fyri? Hvat er endamálið við reforminum? Hetta er ongantíð orðað, ið hvussu er ikki hart ella alment. Eitt ráð hevur sett sær fyri at broyta alla miðnámsskúlaskipanina, og einasta endamálið, ið er komið til sjóndar, er at gera lógararbeiðið einfaldari!

Og hetta snýr seg um vitan, um framhaldslestur, um eina skipan, har vit helst skulu hava omanfyri 90% av ungdómi okkara ígjøgnum. Eitt so fátæksligt endamál kann bert geva eitt líka so fátæksligt úrslit –tíverri!

Bara lúsin útlendsk er

Men uppaftur verri er, tí nú er farið at prutla undir lokinum, síðan Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara alment talaði at, at felagið púrt onki fekk at vita, og enn minni slapp at vera partur av arbeiðinum: Tað fræ私tist, at tað verða uppgávur úr Danmark, tann føroyski ungdómurin skal sita við til próvtøku!

Verða tað danskar uppgávur, so skilji eg betur, at tillagingar eru neyðugar. Tí tað verður Tina Nedergaard, ið skal gera av, hvat vit fáast við og hvussu. Hetta er ikki ókent fyri okkum, tí herfyri var Bertil Haarder farin at halda, at danskur ungdómur var dovin og repiteraði ikki nóg nógv. Umgangandi komu boð út á skúlarnar í Føroyum, at føroyski ungdómurin fekk styttri lesifrí til próvtøku. Skulu uppgávurnar verða á donskum, hví skulu føroyingar so gjalda í dýrum dómum fyri arbeiðið, ið kundi verið fingið úr Danmark? Hví umseta vit ikki bara danska reformin?

Nú vóni eg, at hetta bert er óndsinnað slatur ella misskiljing, tí vit hava í nógv ár gjørt egnar uppgávur á flestu økjum, hóast MMR á summum økjum krevur “eftirliti” frá donskum serfrøðingum og enn bíleggur danskar uppgávur á summum økjum.

Vit duga sjálv

Eg vóni inniliga, at landsstýriskvinnan í mentamálum er so mikið at sær komin, at hon sær, at ungdómur okkara eigur náttúrubornan rætt til at arbeiða út frá egnum fortreytum og ikki donskum. At hon sær, at tað er alt annað enn heppið at flyta vitanartunga vinnu av landinum - einaferð enn.

Latum okkum vóna, at tað hevur hjálpt, at YF hevur talað at hesi mannagongd. Tí í felagnum húsast tey, ið dagliga fáast við vitan og ungdóm –tey hava fakligu vitanina og bestu fortreytir fyri at vera við í arbeiðinum at gera av, hvussu hesi viðurskifti áttu at verið skipað. Tí tungur er tigandi róður....

# Kringvarp Føroya snork svevur!

VINJARD JOHANSEN



*Kringvarpið sendi Dagur & Viku og eina nýggja føroyska sending, Frætt og Fregna, samstundis sum Anna stríddist í X-faktor.*

Anna Nygaard sang sum ein dreymur fríggjakvøldið í X-faktor, og var tað púra óvæntað, at hon gleið út og ikki fekk møguleikan, at vera partur av finaluni í Parkini 27. mars.

Flestu føroyingar eru stoltir av at eiga eina stóra stjørnu, og Anna Nygaard hevur gjørt eitt bragd fyri Føroyar.

Tað verður ofta tosað um at branda Føroyar og brúka okkara vørur til at gera landið kent. Hetta hevur Anna gjørt væl og virðuliga, meðan okkara støðsti fjølmiðil »Kringvarpið« snork svevur í tímanum.

Kringvarpið sendi Dagur & Viku og síðani eina nýggja føroyska sending, Frætt og Fregna, samstundis sum Anna stríddist í X-faktor. Ístaðin fyri at síggja møguleikan í Onnu!

Tað burdi verið eitt krav, at Kringvarpið er við til at stimbra okkara brand. Men hetta sá man einki til í kvøld, har ein opin møguleiki hevði verið at samsent X-faktor við DR, soleiðis at allir føroyingar fingu møguleikan at síggja sendingina, og at atkvøða. Hetta hevði heilt greitt givið Annu eina betri plasering, tí talan var um eina sera javna kapping.

At senda X-faktor tveir tímar eftir, at alt er liðugt, er burturspiltur peningur. Vit hyggjarar, ið gjalda fyri at síggja og hoyra tað, ið rørur seg á frontunum, fáa ikki ágóðan av hesum.

Eg haldi, at tað burdi verið eitt krav, at ein almennur miðil var meira kunnaður um, hvat rørir seg í almenna rúminum, og hvat flestu hyggjarar eru áhugaðir í at síggja ella hoyra. Hetta hevur Kringvarpið ikki gjørt nóg gott hesuferð.

Hetta er ein innilig heilsan til okkara almenna miðil. Kunnið tykkum um, hvat rørur seg runt landið, og hvat lurtarin ynskir at síggja ella hoyra.

Varð hetta gjørt, varð X-faktor sammsent við DR fríggjakvøldið, og Anna Nygaard kundi verið aftur at síggja í næstu viku í X-faktor.

# Dániel profetur og ríki Guds

RICHARD DANIELSEN



## Fyrsti partur

Í Dánielsbók lesa vit, at Nebukadnezar bábelskongur hevði ein dreym, sum hann ikki kundi minnast, tá ið hann vaknaði. Gud opinberaði Dániel dreymin og segði honum eisini, hvussu hann skuldi útleggjast, eftir at Dániel og vinmenn hansara høvdu biðið.

Nebukadnezar hevði droymt eina prýðiliga mynd sera glæsiliga og øðiliga. Høvdið á myndini var av gulli, bróstið og armarnir av silvuri, búkurin og lendarnar av kopari, beinini av jarni og føturnir fyri ein part av jarni og fyri ein part av leiri.

Útleggingin er hendan:

Gullhøvdið var Bábelsríkið, har Nebukadnezar jú var kongur, og Dániel livdi í útlegd og tænti kongin-um.

Silvurið var Medara og Persararíkið.

Kopari var Grikkalandsríkið

Jarnið var Rómararíkið, og føturnir eitt ríki, sum skal koma upp av Rómverjaríkinum, tað ríkið er ikki komið enn.

Kongurin sá í dreymi sínum, at ein steinur var loystur, men ikki við hondum, og hann rakti myndina á føturnar, og alt sorlaðist sundur. Men steinurin vaks til eitt stórt fjall, sum fylti upp alla jørðina.

Um tey fýra ríkini er at siga, at tað gekst júst, sum dreymurin segði.

Kýrus persarakongur breyt seg óvænta inn í tað sterka Bábelsríkið og sigraði á tí.

Eftir at ein tíð so var gingin, kom Alexander tann stóri vestanfrá, sæddur av Dániel í sjón sum ein bukkur við einum stórum horni, hann vann á medarum og persarum, sæddir í sjónini sum ein veðrur við tveimum hornum, Alexander sigraði, og grikkar vóru nú heimsmakt.

Søgan sigur okkum, at seinri løgdu rómverjar alt undir seg, sum var av týdningi og gjørdust harrar í heiminum.

Eftir stendur nú uppfyllingin av fótunum í dreyminum. Sum longu sagt, tað kemur eitt ríki at rísa upp á síðstu tíðum. Um hetta ríkið ljóðaði útleggingin soleiðis: Sum jarn og leiður ikki samtykkja, so skal verða við hesum ríkinum. Har skulu verða tíggju kongar, og tað sigur okkum beinan veg, at her gerst trupult, og tað segði profetiin eisini. Eins og jarn og leiður ikki samtykkja, so verður hetta ríkið. Tað verður bara fyri ein part sterkt, men samstundis veikt. Vit síggja eitt forspæl av hesum fyri okkum í Europa í dag, sum teir hava reint at sameina, tað hevur eisini lukkast, men bert fyri ein part, tey nógvu kongaríkini og tjóveldini eru sum leiður, ið ikki samtykkir við jarn. Eisini er tað nógva tosið í dag, sum vit hoyra um heimssamfelagið, helst eisini eitt forspæl. Hetta stóra veldið við tíggju kongum er framman fyri okkum, helst ógvuliga tætt frammanfyri.

Dániel sá seinni sjálvur í sjónum hetta sama. Hann sá tað á ein annan hátt, sum fýra djór. Tað fjórða djórið hevði 10 horn (teir 10 kongarnir), men so sá hann eitt lítið horn, sum vaks upp, og trí av hinum vóru avslitin. Hesin er einki at ivast í Antikristus. Men tað stendur, at hann verður forkomin. Tá kemur endin og ríki Guds (steinurin) skal valda øllum. Satan og alt tað sum til hann hoyrir verður forkomið.

Síðani kemur ein undurfull tíð, fyrst her á jørðini í túsund ár og síðan í allar ævir saman við Gudi og øllum heilagum í himli.

Framhald.

